| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**16. september 2013** | Blað nr.: **10700** |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **16. september 2013** **kl. 17.30**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 143/13-175/13**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**

Heðin Mortensen
Jógvan Arge
Elin Lindenskov
Helena Dam á Neystabø
Sigrún Mohr
Tróndur Sigurdsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Sjúrður Olsen
Jákup Dam
Marin Katrina Frýdal
Bjørghild Djurhuus

**LUTTÓKU IKKI:**

Annfinn Brekkstein, ið var uttanlands

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**LUTTÓKU EISINI:**

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

**151/13** **<u>2013-0175</u>**

**<u>Mál beind í nevndir</u>**

**Býráðið 16. september 2013:** Tikið til eftirtektar.

**152/13** **<u>2013-0143</u>**

**<u>Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2013</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2013 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 21. februar 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2013 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 21. mars 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

Roknskapurin fyri mars 2013 verður lagdur fram.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri apríl 2013 verður lagdur fram.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 30. mai 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

Roknskapurin fyri mai 2013 verður lagdur fram.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 26. juni 2013:** Framlagt og einmælt goðkent.

Roknskapurin fyri juni og juli 2013 verður lagdur fram.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 16. september 2013:** Framlagt og góðkent.

**153/13** 2013-2091

**Ársroknskapur og grannskoðanarprotokoll fyri 2012 hjá Westward Ho**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Roknskapurin fyri 2012 verður latin Tórshavnar kommuna til góðkenningar sambært § 6 í reglugerð fyri Westward Ho.

Grannskoðaður roknskapur fyri Westward Ho fyri 2012 verður framlagdur.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna roknskapin.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**154/13** 2012-1542

**Sertannlæknastova í Skúlanum við Løgmannbreyt**

Avtalan við Bergtóru Hanusardóttir um ortodontiviðgerðir sambært lógini um kommunala barna- og ungdómstannrøkt er uppsøgd.

Til tess at skipa eina varðandi kommunala loysn á hesum serstaka parti av virkseminum hjá Tannlæknastovuni, er ætlanin at innrætta klinikk til serviðgerðirnar í

tannlæknahølunum í Skúlanum við Løgmannabreyt. Kommunan hevur harumframt sett í starv tannlækna við ortodontiútbúgving, og fer kommunan sostatt at røkja alla hesa tænastuna sjálv.

Til endamálið skal keypast nýggj útgerð. Eisini skulu ávísar hølistillagingar gerast. Talan er um 3 tannlæknastólar við allari tilhoyrandi útgerð, útbúnaði og hølum.

Samlaða kostnaðarmetingin fyri útgerð og hølistillagingar er beint undir kr. 3 mió v/mvg. Tannlæknaútgerðin og útbúnaður annars er mett til kr. 1.996.237, harav kosta tannlæknastólarnir við útgerð uml. 1,7 mió. Hølistillagingarnar eru mettar til kr. 1.003.000, har størstu postarnir eru timburarbeiði og køkur, innbúgv og HSV-og EL-arbeiði.

Á íløguætlanini fyri 2012 á grein 2 eru kr. 1 mió settar av til at staðseta og byggja tannlæknamiðstøð. Ætlan hevur verið at byggja nýggja tannlæknamiðstøð bæði til vanligu barnatannrøktina og serviðgerðirnar (ortodontiina). Nú ætlanin er at innrætta sertannlæknaklinikk fyri seg, má ætlanin um tannlæknamiðstøð endurskoðast. Mett verður tí, at til ber at nýta hesa upphædd sum part av kostnaðinum at etablera sertannlæknastovuna í staðin.

Skal ætlanin setast í verk, má írestandi fígging kr. 2 mió fáast til vega. Á grein 2 er settar kr. 1 mió av til kommunalar íbúðir. Henda ætlan kann útsetast vísandi til samskiftið, sum er við Húsalánsgrunnin um at byggja luta- og leiguíbúðir. Upphæddin kann tí flytast til sertannlæknastovuna. Aðrar tøkar íløgujáttanir eru ikki á grein 2. Møguleiki er at játta kr. 1 mió av framfluttum løgukarmi kontu 4175 Dagføring av skúlum. Hetta svarar til kostnaðin av teimum tillagingum, ið gerast skulu í skúlahølunum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á sosialu deild og leiðarin á mentamáladeildini mæla til at etablera sertannlæknastovu í tannlæknahølunum í Skúlanum við Løgmannabreyt og játta kr. 1 mió av íløgukontu 2375 Tannlæknamiðstøð, kr. 1 mió av íløgukontu 2575 Kommunalar íbúðir, og kr. 1 mió av íløgukontu 4175 Dagføring av skúlum.

**Sosiala nevnd 26.juni 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um at játta 1 mió. kr. til endamálið av íløgukontu 4175 Dagføring av skúlum, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd og mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Endaligur byggiroknskapur er nú gjørdur fyri kontu 2375, L23001 Sertannlæknahøli í Skúlanum við Løgmannabreyt.

Byggiroknskapurin vísir eina samlaða nýtslu á kr. 2.675.132,10. Íløgujáttanin var kr. 3.000.000. Staðfestast kann sostatt eitt avlop á kr. 324.867,90.

Íløguverkætlanin skal lokast.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at loka verkætlanina konta 2375 (Tannlæknamiðstøð), L23001 Sertannlæknahøli í Skúlanum við Løgmannabreyt, og at avlop kr. 324.867,90 verður flutt yvir á kontu 2275 (læknahølir), L22002 Kommunulæknaskipan.

**Trivnaðarnevndin 10. juni 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við trivnaðarnevndini.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av máli 2012-1542.

**Mentamálanevndin 2. august 2013:** Nevndin samtykti at mæla til at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Býráðslimir tóku um teldutpost undir við at seta samtyktina hjá mentamálanevndini í verk at formliga góðkenna á seinni fundi í fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**155/13** **2012-2852**

**Val av hegn- og vatnsýnisnevnd fyri 4 ár.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sbrt. § 44 í lóg nr. 171 "Om hegn og markfred" frá 18. mai 1937 og § 15 í lóg nr. 169 "Om benyttelse af indsøer og vandløb" frá 18. mai 1937 velur býráðið 3 hegn- og vatnsýnismenn.

Samstundis verða valdir 3 tiltakslimir.

**Býráðið 29. novebmer 2012:** Vald vórðu

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
| --- | --- |
| Jan Poulsen | Karlon Winther |
| Torvald Lützen | Heri Ó. Dam |
| Júst Rubeksen | Hans Silvan Johannesen |
| Eddie Joensen | |
| Jákup av Skarði | |
| Anna Rubeksen | |
| Snorri á Bøgarði | |

**Ískoyti:**
Jan Poulsen hevur sagt seg úr nevndini.

**Býráðið 16. september 2013:** Heri Ó. Dam varð valdur sum fastur limur fyri Jan Poulsen.

**156/13** **2010-0819**

**Umsókn um at Tórshavnar kommuna yvirtekur vegin og gongubreyt inni á bústaðarøkinum á Berjabrekku 1 og 2**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Eigarafeløgini fyri 1. og 2. byggistig á Berjabrekku søkja um, at kommunan formliga yvirtekur vegin og gongubreyt inni á teirra øki. Somuleiðis verður søkt um, at kommunan frameftir viðlíkaheldur vegirnar í síni heild, eisini viðvíkjandi kavarudding.

**Tilmæli:**
Deildarleiðarin á løgdeildini mælir til at málið verður beint í viðkomandi faknevnd(ir) til ummælis.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2010:** Samtykt ikki at ganga umsøknini á møti, vísandi til at vegaøkið inngongur í útrokningargrundarlagið fyri byggiloyvi til byggingina á Berjabrekku. Vegaøkið er at skilja sum partur av samlaða økinum og kann sostatt ikki skiljast frá nú, av tí at alt økið er roknað við, tá ið útstykkingarætlanin varð góðkend.

**Ískoyti:**
Eftirfylgjandi hava nevndu eigarafeløg sett fram ynski um at kommunan átekur sær at asfaltera vegirnar inni á Berjabrekku. Vegirnir eru í ógvuliga ringum standi. Á fundi hjá borgarstjóranum framførdu formenninir fyri eigarafeløgunum Berjabrekka 1 og 2 síni sjónarmið og hareftir varð ástaðarfundur hildin, so at kommunan kundi fáa sjón fyri søgn. Eigarafeløgini førdu fram, at vanligir skattgjaldarar ikki skuldu havt ábyrgd fyri at asfaltera veg, har almenningurin ferðast og serliga í hesum føri, tá ið kommunan sjálv stóð fyri útstykkingini. Harumframt søgdu formenninir seg ivast í hvør átti vegin. Tað er tó, sambært løgdeildini, ongin ivi um hvør eigur vegin, j.nr. 2010-0819/10. Sí eisini j. nr. 2000-2712 Yvirtøka av privatum vegum.

**Fíggjarligt:**
Sum avtalað á ástaðarfundinum, hevur umsitingin gjørt eina kostnaðarmeting, har asfaltering av øllum vegunum kostar yvir eina millión. Umsitingin hevur eisini gjørt eina aðra kostnaðarmeting, har kostnaðurin kann haldast á uml. kr. 600.000. Sí j.nr. 2010-0819/8.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla frá at ganga umbønini á møti, vísandi til at vegaøkið er privat ogn og annars við somu grundgevingunum sum fíggjarnevndin 16. juni 2010.

**Tekniska nevnd 5. apríl 2011:** Nevndin samtykti at beina málið aftur í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. september 2011:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Eigarafelagið hevur aftur vent sær til kommununa við ynski um at fáa loyst viðurskiftini viðvíkjandi dagføring av vegunum inni á økinum á Berjabrekku. Víst var millum annað á, at stórar lagdir eru í vegnum og at innkoyringin til Sundsvegin treingir til at dagførast.

Forkvinnan ynskir at viðgera málið.

**Tekniska nevnd 22. mai 2012:** Nevndin samtykti at asfaltera Berjabrekku, men av tí at asfaltætlanin er samtykt, er ikki fíggjarligt rúm fyri arbeiðinum í ár. Heitt verður tí á fíggjarnevndina um at útvega fígging.

Nevndin samtykti eisini at beina málið í fíggjarnevndina, um at virka fyri at kommunan yvirtekur allar privatar vegir fyri á tann hátt at kunna røkja allar almennar vegir eins.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Umsitingin arbeiðir víðari við málinum og einari ætlan um at flokka allar vegir í kommununi við tí fyri eyga at útgreina leistin fyri møguligari kommunalari yvirtøku av vegunum.

Nevndarlimur hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Tekniska nevnd 12. juni 2013:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr, Helena Dam á Neystabø og Bogi Andreasen, samtykti at málið verður tikið upp í sambandi við viðgerð av málinum um yvirtøku av privatum vegum.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, vísir til samtyktina í teknisku nevnd 22. mai 2012, har samtykt varð at asfaltera Berjabrekku og at arbeiðið verður gjørt í ár og fíggjað av játtanini til asfaltering. Somuleiðis vísir hon til samtyktina um at beina málið í fíggjarnevndina um at virka fyri at kommunan yvirtekur allar privatar vegir fyri á tann hátt at kunna røkja allar almennar vegir eins.

**Ískoyti:**
Býráðslimur biður um málið á skrá.

**Býráðið 16. september 2013:** Málið beint í teknisku nevnd.

**157/13** **<u>2013-2013 KF</u>**

**<u>Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Myllutjørn við nýggjari áseting um loyvi til at byggja vindfang.</u>**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
25. juni 2013 viðgjørdi tekniska nevnd umsókn frá Eigarafelagnum við Myllutjørn vegna Jeanette Blaasvær, um loyvi til at gera eitt vindfang á hús hennara við Myllutjørn.

Tekniska nevnd samtykti at gera eina broyting í serstøku byggisamtyktini fyri Myllutjørn, soleiðis at møguleiki er fyri, at øll sethúsini við Myllutjørn fáa loyvi at gera veggir við høvuðshurðina á veghædd, sum verju ímóti vindi við ávísum treytum.

Býarskipanardeildin mælir til at seta nýggja grein 5 í §4 – bygging, stødd, staðseting og snið húsanna.

> *Stk. 5.* Loyvt er at byggja veggir báðu megin høvuðshurðina á veghædd, sum verju ímóti vindi.
>
> 5.1 Veggirnir kunnu bert verða innanfyri byggifelt 4.
> 5.2 Ikki er loyvt at inniloka hendan part

Ein annar trupulleiki, ið hevur víst seg í sambandi við bygging við Myllutjørn er, at tey allar flestu ynskja at klæða og bjálva veggin ímóti grannamarki.

Í serstøku byggisamtyktini stendur í §4, stk. 1, 1.5 "Húsasíða í mark skal verða 20 cm betongveggur í minst 3 m hædd, mált frá grannastykki. Hetta er tó ikki galdandi fyri hús nr. 8, 23, 38 og 54"

Býarskipanardeildin mælir til at eitt nýtt stk. 1, 1.5 verður sett inn

1.6 Loyvt er at klæða og bjálva betongveggin ímóti grannamarki treytað av, at klædningurin ikki fer inn um grannamark.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at serstaka byggisamtyktin fyri Myllutjørn verður broytt soleiðis, at soljóðandi nýtt stk. 5 verður sett inn í §4 – bygging, stødd, staðseting og snið húsanna.

*Stk. 5.* Loyvt er at byggja veggir báðu megin høvuðshurðina á veghædd, sum verja ímóti vindi.

5.1 Veggirnir kunnu bert verða innan fyri byggifelt 4.
5.2 Ikki er loyvt at inniloka hendan part

og soljóðandi stk. 1.6.5 verður sett inn í §4, stk. 1.

1.6 Loyvt er at klæða og bjálva betongveggin ímóti grannamarki treytað av, at klædningurin ikki fer inn um grannamark.

**Tekniska nevnd 4. september 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Bogi Andreasen og Helena D. á Neystabø luttóku ikki í viðgerðini av hesum málinum.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**158/13** **<u>2013-1839 KF</u>**

**Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri F-øki við Hoydalsá millum Villingadalsvegin og Sundsvegin**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Júst Rubeksen søkti í juni 2012 um gerð av nýggjum frítíðarøki við Hoydalsá millum Villingadalsvegin og Sundsvegin, nakað omanfyri Undir Brúnni (j. nr. 2012-1474).

Fleiri fundir hava verið við umsøkjaran, og málið hevur verið viðgjørt á fundi í teknisku nevnd, seinast 15. mai 2013, har samtykt var, at byggisamtyktin skal broytast (j. nr. 2013-1788) og at býarskipanardeildin arbeiðir víðari í samstarvi við umsøkjaran við endaligari skipan og serstakari byggisamtykt fyri F-øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at taka undir við serstøku byggisamtyktini fyri F-øki við Hoydalsá millum Villingadalsvegin og Sundsvegin.

**Tekniska nevnd 4. september 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Bogi Andreasen og Helena D. á Neystabø luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**159/13** **2013-1788 KF**

**Uppskot til broyting av almennu byggisamtyktini við Hoydalsá niðan til vatnbrunnarnar**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at heildarætlanin fyri Tórshavnar kommunu var liðug í 2003 samtykti býráðið uppskot um broyting av almennu byggisamtyktini, soleiðis at nýggj byggiøkir vóru løgd út í Hoyvíkshaganum og við Villingadalsvegin (j. nr. 2003-2273). Økið millum A3 økini í Hoyvíkshaganum og við Villingadalsvegin var verandi 4. Grundumráði.

Nú fyriliggur ein umsókn frá Júst Rubeksen um at gera Frítíðarøkið á hesum staðnum (J. nr. 2012-1474). Hetta málið var viðgjørt á fundi í teknisku nevnd tann 15. mai 2013, har samtykt var, at byggisamtyktin skal broytast og at býarskipanardeildin arbeiðir víðari, saman við umsøkjaranum við endaligari skipan og serstakari byggisamtykt fyri F-øki.

Býarskipanardeildin mælir til, at byggisamtyktin verður broytt soleiðis, at frítíðarøkið verður útlagt sum F-øki og restin av økinum millum A3-økini niðan til vatnbrunnarnar verður broytt til D1-øki sum framhald av D1-økinum, sum strekkir seg frá Boðanesi. Síðani verður ein serstøk byggisamtykt fyri F-øki gjørd í samstarvi við umsøkjaran.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at almenna byggisamtyktin verður broytt sambært kortskjali dagfest 15. juli 2013.

**Tekniska nevnd 4. september 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Bogi Andreasen og Helena D. á Neystabø luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**160/13** **2013-1838 KF**

**Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri íbúðarbygging oman Mattalág**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Felagið Bústaðir, fyrrverandi Húsalánsgrunnurin, hevur ætlanir um at byggja leiguíbúðir á matr. nr. 897e og 897k, oman Mattalág í Tórshavn.

30. mai 2013 samtykti býráðið at broyta byggisamtyktina fyri ognirnar frá A1 til A3 øki fyri at gera tað møguligt at byggja íbúðir her (j.nr. 2013-1062).

Ætlanin er at byggja 34 íbúðir í ymiskum sniðum og støddum.

Sambært almennu byggisamtyktini kunnu útstykkingar í A3-øki bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

Í sambandi við projekteringina av ætlaðu byggingini, eru Bústaðir farnir undir at taka jørðprøvar inni á økinum. Komið er millum annað fram til, at kommunala høvuðskloakkin, ið liggur tvørtur ígjøgnum ognina og sum liggur rættiliga grunt, ikki lýkur teknisku ásetingarnar, tí leki er staðfestur. Talan er um eina ca. 55 metur langa ø500 betong-kloakkleiðing, sum treingir til dagføringar. Bústaðir ætla at umleggja hesa kloakkleiðing, tí hon kemur at nerva ætlaðu bygingina.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Tað fyriliggur eitt tilboð, dagf. 21.08.2013, frá arbeiðstakara til Bústaðir uppá umleggjan av kloakkleiðingini. Talan er um umlegging av samanlagt 190 m og er samlaða tilboðið áljóðandi kr. 607.694,- u/mvg.

**Tilmæli:**
Vísandi til at kommunan hevur ábyrgd av øllum høvuðskloakkleiðignum og har talan er um gamlar leiðingar, ið treingja til at verða umlagdar ella dagførdar, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til, at kommunan fíggjar kostnaðin fyri umleggingina av hesi kloakkleiðing.

Mælt verður til at fíggja arbeiðið álj. kr. 700.000,- í sambandi við íløgukarmar fyri kloakkarbeiði í 2014 og annars at beina málið hesum viðvíkjandi í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 4. september 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Bogi Andreasen og Helena D. á Neystabø luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**161/13** **2010-0872 LH**

**Bárður Ljósheim: Áheitan um at kloakkleiðing á matr. nr. 1098g, Tórshavn verður flutt av hansara øki**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Bárður Ljósheim hevur í t-brævi 10.04.2010 vent sær til kommununa við umbøn um at flyta kloakkleiðingina á sunnaru síðu á ogn hansara, matr. nr. 1098g, Tórshavn. Eisini verður biðið um at flyta gøtuna, sum liggur inni á hansara ogn.

Nógv samskifti hevur verið millum umsiting og Bárð Ljósheim um málið.

Ein háttur at loysa málið er, at kommunan ognar sær tað lendið, ið gøtan av ókendum orsøkum nú er staðsett. Talan er um ca. 80 fermetrar, sum kunnu verða lagdir at matr. nr. fy. Á henda hátt er bæði gøta og høvuðskloakkleiðing inni á kommunalum øki. Eftirfylgjandi kann kommunan so taka upp samskifti við eigararnar av matr. nr. 1098c og 1098d um at fáa teir at ogna sær øki, har teir av ókendum orsøkum hava bygt garð og plantað.

Mett verður at tað er ein meiri hóskandi loysn at fara undir samráðingar um at útvega kommununi økið undir gøtuni heldur enn at kommunan skal flyta gøtuna á kommunala ogn, sum grannar sunnanfyri hava bygt á.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at ogna sær omanfyri nevnda lendi og heimila umsitingini at gera uppskot til keypsavtalu av teimum 80 fermetrunum við Bárð Ljósheim at leggja fyri fíggjarnevndina aftur. Harumframt verður mælt til at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 25. juni 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. juni 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**162/13** **<u>2005-1183</u>**

**<u>Reinsaríið í Tórsgøtu</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Vísandi til undanfarna samtykt í málinum, har játtaðar eru kr. 450.000 til kanningar og ráðgeving at bjóða arbeiðið út í høvuðsentreprisu, hevur arbeiðið higartil leitt fram til, at mælt verður til at broyta leist fyri hetta arbeiðið.

Orsøkin er, at kanningarnar av bygninginum hava víst, at umvælingararbeiðið í stóran mun best kann skipast sum smáar einkult standandi arbeiðstøkur, sum noyðast at fremjast í stigum, fyri at kunna taka støðu til, hvussu farast skal víðari fram. Hetta er serstakliga grundað á, at talan er um ein gamlan bygning, sum fyrst hevur havt nógva og skiftandi nýtslu, og síðan hevur staðið tómur. Hetta hevur havt sína ávirkan á týðandi bygningslutir, og neyðugt er sostatt at bróta niður partar fyri at fáa eina hylling á, hvussu farast skal víðari fram.

Tá talan er um slíkt arbeiði, sum nærum kann samanberast við restaureringsarbeiði, verður ofta mett, at tað er sera óheppið at binda seg til eina høvuðsentreprisu í sáttmála. Vandi er fyri at koma í ta støðu, at eitt av arbeiðunum avdúkar so týðandi trupulleikar, at neyðugt kann verða við munandi fleiri pengum fyri at fremja lidnu loysnina eftir avtaluni, sum er sáttmálabundin. Og tá hevur byggiharrin ringar møguleikar at annaðhvørt steðga á ella skifta loysn uttan stórar eykakostnaðir.

Skotið verður tí upp at brúka annan leist, at samlaða íløgujáttanin, ið eftir er, kr. 1.050.000, verður játtað til verkætlanina, og at bjóða arbeiðið út í smærri arbeiðstøkur sum undirhondsboð, so hvørt sum ein arbeiðstøka er avklárað.

Kostnaðarmeting fyri fyrsta umbyggingarstig verður løgd fram á fundinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1.050.000 av kontu 5376, L53002 Reinsaríið stigvis umbygging, og at einstøku arbeiðstøkurnar verður bodnar út sum undirhondsboð.

**Mentamálanevndin 9. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 24. november 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundi við Tórshavnar kommunu 16. november 2011 vísti Felagið MenTón á vantandi tónleikaumstøður í Havn, og ynski varð sett fram um, at Reinsaríið í Tórsgøtu verður spælistað. Teirra meting er, at tann núverandi ætlanin ikki er nøktandi til teirra virksemi. Í hesum sambandi er neyðugt at kanna, um til ber at laga verkætlanina til tørvin hjá tónleikarunum, herundir ljóðviðurskifti.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 75.000 av kontu 5366 Stuðul annars til at kanna, hvussu bygningurin best verður lagaður til tørvin hjá tónleikinum.

**Mentamálanevndin 30. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Mikael Viderø, býararkitektur, varð biðin um at kanna um Reinsaríið eisini kann brúkast til rytmiskt spælistað.

Kontrast Arkitektar hevur gjørt nýtt uppskot av Reinsarínum.

Í nýggja uppskotinum, januar 2012, verður m.a. sagt:

“ Reinsaríið verður í dag eina mest nýtt til konsertir. Uppruna uppskotið var, at húsið skuldi nýtast til fleiri ymisk endamál, til tónleikaframførslur, almen tiltøk, bókakafe, uppihaldsstað fyri ungdómar á útferð, herundir dag- og frítíðarstovnar. Tað hevur verið eitt ynski, at broyta ætlanina, soleiðis at møguleiki er at brúka húsið til rytmiskt spælistað. Tískil eru ávísar broytingar gjørdar í mun til fyrra uppskotið. Meira luft er nú millum hæddirnar fyri at økja um rúmd (volumen). Men annars er tankin tann sami, við einum gjøgnumgangandi multifunktionaliteti.

Byggilistarliga hugskotið byggir uppá, at samantvinna tað gamla við nakað nýtt. Innan verður tað gamla varðveitt, sum er merkisvert í sær sjálvum, og við nýggjari innrætting og nútíðar sniði fæst ein meira tíðarhóskandi og nýtiligur bygningur. Hugskotið byggir eisini uppá at fáa ein polyvalentan bygning, sum við sínum mongu tiltøkum kann broyta funktión eftir tørvi. Hetta, at hava rúmini so opin sum møguligt og funktiónirnar mobilar. Rýmingartrappa í norðurskjøldrinum er eisini hugsað sum brúkstrappa.

Veghæddin skal kunna nýtast til rytmiskan tónleik, men eisini er møguleiki fyri øðrum framførslum. Pallurin verður í vestursíðuni á fyrstu hædd, við sitiplássum kring pallin, samstundis sum sitipláss verða kring opið á aðru hædd.”

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at arbeiða víðari eftir uppskotinum frá januar 2012, til eisini at gera Reinsaríið til eitt rytmiskt spælistað og samstundis varðveita multifunktionalitetin.

Á íløguætlanini 2012 konto 5375 eru avsettar 1 mió. kr.

Mælt verður til at játta 1 mió. kr. av íløgum 2012 til at arbeiða víðari í sambandi við liðugtgerð av Reinsarínum.

**Mentamálanevndin 11. januar 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina partin um peningajáttina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 1 mió. av íløguætlanini 2012 konto 5375 til at arbeiða víðari í sambandi við liðugtgerð av Reinsarínum.

**Ískoyti:**
Samsvarandi viðmerkingum frá húsaumsitingini og byggideildini hevur Kontrast tillagað uppskotið frá januar 2012, har dentur varð lagdur á at fáa viðurskifti í lagi í sambandi við bruna, funktión, kloakk, umhvørvi, trygd, lyftu, rørslutarnað o.a.

Gjørd er tí nýggj kostnaðarmeting, har samlaði kostnaðurin nú er mettur til 6,8 mió. kr. við mvg.

Ætlanin hevur verið at gera arbeiðið í stigum og í fyrsta umfari at fremja kjallarahæddina og miðhæddina. Hesin partur er mettur at kosta 3,5 mió kr. við mvg.

Á kontu 5375 L53002 eru 2,1 mió kr. tøkar til endamálið. Á íløguætlanini fyri 2013 konta 5375 eru avsettar 3 mió kr. aftrat.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 3 mió. kr. av íløgukontu 5375 til kontu 5375 L53002 Reinsaríið til at arbeiða víðari við liðugtgerðini.

**Mentamálanevndin 27. februar 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og harumframt til at mæla býráðnum til at játta 2 mió. kr. afturat til liðugtgerð, ið verður at fíggja soleiðis: kr. 1.660.000 av konto 5375 Skálatrøð og kr. 340.000 av konto 5175 Musikkskúlin. Játtanin upp á 2 mió. kr. til liðugtgerð er treytað av undirtøku frá mentamálanevndini.

**Mentamálanevndin 20. mars 2013:** Samtykt at taka undir við fíggjarnevndar-samtyktini 13. mars 2013.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Lisitatiónsúrslit:
Í sambandi við arbeiðið at at gera Reinsaríið til spælistað, var fyri uml. 2 mánaðum síðani arbeiði við niðurtøku og ísblásing av gamla timbrinum boðið út og sett í verk, meðan restin av útbjóðingartilfarinum var gjørt klárt. Tilboðini upp á hesi arbeiðini upp á uml. kr. 520.000 u/mvg.

Lisitatión í sambandi við restina av arbeiðinum, var hin 16. juli 2013. Fimm virkir vóru innboðin at lata inn tilboð, og trý teirra lótu inn tilboð.

Tilboðini vóru hesi:

Húsavarðartænastan: 4.947.191,- u/mvg
Træsmiðjan: 6.449.032,- u/mvg
Articon: 7.966.393,- u/mvg

Arkitekturin hevur eftirkannað tilboðini, og mælir til at taka av lægsta tilboðnum, frá Húsavarðatænastuni.

Fíggjarviðurskifti:
Við grundarlagi í omanfyri nevndu tilboðum upp á niðurríving, ísblásing og høvuðsarbeiðstøku, umframt keyp av elevatorstóli, verða samlaðu handverkaraútreiðslurnar mettar til kr. 5.772.000 u/mvg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til fylgjandi:

1. at taka av lægsta tilboðnum, og heimila umsitingini at gera sáttmála við Húsavarðatænastuna

**Mentamálanevndin 2. august 2013:** Nevndin samtykti at mæla til at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Býráðslimir tóku um teldupost undir við at seta samtyktina hjá mentamálanevndini í verk at formliga góðkenna á seinni fundi í fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**163/13** **2012-0732**

**HIT húsið – House of innovation Tórshavn (ìverksetarahús í Kongagøtu)**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Ætlanin er at kanna møguleikan fyri at seta á stovn Íverksetarahús í Tórshavn. Tað er alneyðugt, at fleiri vinnuvirkir verða sett á stovn í kommununi, og kundi hetta tiltakið stuðla undir tí.

Íverksetarahúsið kann betra um vakstrarmøguleikarnar hjá íverksetarum. Kommunan er við til at skapa eitt umhvørvið, soleiðis at íverksetarar kunnu læra av hvørjum øðrum v.m. Samstundis er møguleiki fyri at savna vitan, sum kann stuðla íverksetarum, eitt nú innan fígging, útflutningur, marknaðarføring, patent v.m.

Kommunan innrættar íverksetarahúsið við skrivstovum, fundarhøli, køki, atgongd til streym, net og printara. Telduútgerð og telefonir útvega íverksetarar sjálvir.

Virsksemið má ikki vera kappingaravlagandi. Tí er neyðugt at seta karmar upp fyri húsið. Millum annað má støða taka til:

- Hvussu leingi kann ein íverksetari vera inni í húsinum?
- Hvussu nógvar fermetrar ella fólk kann ein fyritøka hava inni í húsinum?
- Skulu avmarkingar setast fyri, hvør kann vera í húsinum?
- Húsaleiga?

Kommunan setir hús til taks, men virksemið skal hvíla í sær sjálvum.

Møguligt skal vera at leiga eitt skrivaraborð í ein dag, ella eitt høli í mðr. Etableraðar fyritøku skulu eisini kunna leiga fundarhøli t.d. til videoráðstevnur. Møguleiki eigur eisini at vera fyri at skapa samstarv millum íverksetarar og fyritøkur í kommununi.

Húsið skal verða smart, eggja til skapan og bjóða uppá hentleikar, tíðarrit o.l. so uppfinnaratýpur, designarar, rithøvundar, app-mennarar trívast.

Íverksetarahús kann setast á stovn í Kongagøtu. Uppstarturin verður fíggjaður av konto 7310 Vinnustrategi. Kommunan kundi heitt á Áka Johansen, fyrrverandi sendimann og starvsfólk á Menningarstovuni um at orða upprit til karm fyri húsið, sum verður at leggja fyri fíggjarnevndina aftur á næsta fundi.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur saman við arkitekti gjørt nærri kanningar av møguleikanum at gera Kongagøtu 7 um til íverksetanarhús. Mett verður, at verkætlanin letur seg fremja, men at tað má gerast stigvíst, grundað á fíggjarlig viðurskiftir og tørv.

Í fyrsta byggistigi verða tvær hæddir innrættaðar. Tvær tær seinnu hæddirnar og fasada verða innrættaðar seinni, tá írestandi fígging er fingin til vega, vónandi partvíst frá sponsorum millum vinnulívið í býnum og/ella íleggjarum aðrastaðni.

Tvær tær fyrstu hæddirnar verða innrættaðar av nýggjum. Gjørt verður eitt fundarhøli, ein køkur/upphaldsrúm, tvey vesi, har annað er til rørslutarnaði, og eitt kopi/goymslurúm. Restin verður innrættað til einkult skrivstovur og felagsskrivstovuhøli.

Eins og gjørt verður í grannalondum, verður skipað fyri samstarvi við verandi vinnulív og útbúgvingarstovnar í Tórshavnar kommunu um ráðgeving, verkætlanir og virksemi húsinum í heila tikið. Fróðskaparsetur Føroya og Vinnuhúsið hava víst áhuga fyri ætlanini.

Ætlanin er at skipa fyri nøkrum sponsurpakkum, ið gera tað møguligt hjá vinnuni at stuðla íverksetanarhúsinum og afturfyri fáa umrøðu í faldarum, heimasíðu, apps o.l. hjá húsinum. Ynski er eisini um at byggja upp eitt størri samstarvsforum millum vinnu og umsiting í høvuðsstaðnum.

Reglugerð verður gjørt fyri húsið, sum ásetur, hvør hevur ábyrgdin av húsinum, hvør kann fáa innivist í húsinum, undir hvørju treytum og hvussu longi. Sett verður upptøkunevnd at meta um, hvørt hugskot hjá íverksetarum eru somikið búgvið og burðadygg í longdini, at viðkomandi kann fáa innivist.

Leigikostnaður og hvat fæst fyri leiguna, depositum, uppsagnartíð o.l. verður ásett í standard leigusáttmála.

Umvæling av húsinum er mett at kosta uml. 4 mió. kr. Fyrsti partur er mettur til uml. 2 mió. kr.

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at taka undir við, at húsið í Kongagøtu 7 verður brúkt til íverksetarahús.

Fyrsti partur verður fíggjaður soleiðis:
Konto 7310 Vinnustrategi, framflutt frá 2011 kr. 1,25 mió.
Konto 7310 Vinnustrategi, játtan 2012 kr. 0,4 mió.
Konto 1313 Teknisk fyrisiting, framflutt frá 2011 kr. 0,5 mió.

Biðið verður um, at kr. 0,5 mió verða fluttar frá 1313 til 7310 sum eyka játtan.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Tíðin stendur ikki í stað og tíðin hevur ikki arbeitt fyri Tórshavnar kommuna seinastu árini. Almennir stovnar og skúlar verða fluttir á bygd og fiskivinnan er fánað burtur. Meiri lív kundi verið í miðbýnum og barnatalið minkar.

Kommunan eigur at viðvirka til, at dynamikkurin og skapanarhugurin, ið er í einum býi, sum hevur rætta lutfallið millum privatu vinnuna og almen starvspláss, hevur betri sømdir. Samstarvið millum Tórshavnar kommunu og vinnulívið má betrast.

Vit mugu í tættan dialog við vinnuna, so at vinnulívið kennir, at vit eru viðspælarar. Vit mugu gera karmarnar um vinnulívið meira fjøltáttaðar, og hava eitt breiðari fokus.

At gera keikant og stór ídnaðarstykki er gott, men fyri eina framsøknað kommunu er neyðugt við einum breiðum vinnulívspolitikki. Vit mugu skapa betri vakstrararmøguleikar hjá teimum, ið hava góð hugskot.

Her er HIT-húsið ein sera góð byrjan og eitt ógvuliga sterkt signal at senda. Eitt signal, ið ikki kann undirmetast og sum ein høvuðsstaður kann branda seg við.

**Tilmæli**
Stjórnin mælir býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at taka undir við, at húsið í Kongagøtu 7 verður brúkt til íverksetarahús og at fíggja húsið soleiðis:

Fyrsti partur verður fíggjaður soleiðis:
Konto 1110 Býráð kr. 200.000
Konto 1311 Miðfyrisitingin kr. 300.000
Konto 1560 Tænastumannaeftirlønir kr. 200.000
Konto 7310 Vinnustrategi, kr. 942.000
Konto 5373 Skálatrøð framtíðarætlan kr. 1.000.000

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 1. november 2012:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Anfinn Brekkstein, Inga Dahl og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**Býráðið 13. desember 2012:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Anfinn Brekkstein, Inga Dahl og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**Vinnunevndin 25. februar 2013:** Kunnað varð um málið og avgjørt varð at fara til verka.

**Ískoyti**
Arbeitt hevur verið víðari við málinum um at skipa nýskapanarhús í Kongagøtu 7, m.a. hava fundir verið við Vinnuframa um tørv og stuðulsmøguleikar. Vinnuframi er áhugað í at vera við í eini verkætlan í Tórshavnar kommunu við at stuðla nýskapandi vinnum t.d. við húsaleigukostnaði.

Arbeitt hevur eisini verið víðari við ætlanini at umbyggja bygningin í Kongagøtu 7 til nýskapanarhús, men mett verður at ov nógv skal gerast við húsini fyri at laga tey til nýggja innihaldið.

Tá saltsølubygningurin er liðugt inrættaður, er ætlanin at hýsa nýskapandi virksemi har. Men fyri at fáa gongd á virksemi sum skjótast verður mælt til at byrja í øðrum bygningi fyribils.

Býráðið hevur avgjørt at selja fleiri bygningar, nú umsitingin verður savnað í BankNordik bygninginum. Ein av hesum bygningum er í Niels Winthers gøtu, sum barna- og ungdómsdeildin húsast í. Hesi hús er væl egnað til íverksetarahús – støddin hóskar væl, tey liggja sentralt og sjónliga og eru klár at brúka uttan umbygging ella umvæling av nøkrum slag. Mælt verður tí til at útseta søluna av hesum bygningi, og brúka hann til nýskapanarhús, til saltsølubygningurin er liðugt inrættaður. Mælt verður somuleiðis til at selja ognina í Kongagøtu 7.

Samstundis verður mælt til at skipa nýskapanarhús við dagligum leiðara í eina royndartíð á tvey ár. Uppgávan verður at skipað fyri samstarvi við vinnulív og útbúgvingarstovnar í kommununi um nýskapanarvirksemi.

Reglugerð verður gjørd fyri húsið, sum ásetir, hvør kann fáa innivist í húsinum, undir hvørju treytum og hvussu leingi.

Leigukostnaður og hvat fæst fyri leiguna, depositum, uppsagnartíð o.l. verður ásett í standard leigusáttmála.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at

- Brúka húsini hjá kommununi í Niels Winthers gøtu til nýskapanarhús, til saltsølubygningurin er liðugt umvældur
- Selja ognina hjá kommununi í Kongagøtu 7
- Játta 2 mió kr. av teimum 2.642.000 kr., ið vórðu játtaðar at fíggja nýskapanarhús í Kongagøtu 7 til at fíggja eina 2 ára royndarverkætlan við nýskapanarhúsi í Niels Winthers gøtu.
- At umsitingin ger uppskot til reglugerð fyri húsið at leggja fyri nevndina aftur.
- At nevndin finnur húsinum eitt hóskandi navn

**Vinnunevndin 2. august 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, og at nevna nýskapanarhúsið Hugskotið, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og nevna húsið *Nýskapanarhúsið Hugskotið* og við eykajáttan játta kr. 2 mió. frá konto 7375 vinnuverkætlanir L73001 HIT-húsið - til 7310 vinnustrategi.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**164/13** **2005-1685**

**Umsókn um góðkenning av broyting av grein 7 í viðtøkunum fyri Eigarafelagið í Maritugøta.**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Limirnir í Eigarafelagnum í Maritugøta hava á aðalfundi í 2009 samtykt at broyta grein 7 í viðtøkunum. Men av misgávum var avgerðin um hesa broyting ongantíð send býráðnum.

Sambært galdandi viðtøkum, skal Tórshavnar býráð góðkenna broytingar í viðtøkunum, og Eigarafelagið heitir á Tórshavnar býráð um at góðkenna broytingina í grein 7.

Talan er um hesa broyting:

Broytingin í § 7:

**Upprunaligi teksturin**: «*Hvør limur hevur eina atkvøðu. Eru fleiri eigarar av einum grundøki, hava hesir í felag eina atkvøðu. Eigaraíbúðarfeløg hava á aðalfundi ½ atkvøðu fyri hvørja eigaraíbúð innan viðkomandi eigaraíbúðarfelag*»

**Nýggja orðingin, ið aðalfundurin góðkendi** «*Hvør limur hevur eina atkvøðu. Eru fleiri eigarar av einum grundøki, hava hesir í felag eina atkvøðu. Eigaraíbúðarfeløg hava á aðalfundi eina atkvøðu fyri hvørja eigaraíbúð innan viðkomandi eigaraíbúðarfelag*»

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla fíggjarnevndini og býráðnum til at góðkenna broytingina í grein 7 fyri Eigarafelagið í Maritugøtu.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**165/13** **<u>2010-2717</u>**

**<u>Yvirlit yvir lidnar verkætlanir og aðrar verkætlanir – um at gera upp og loka</u>**

**Málslýsing - samandráttur**
Í sambandi við viðgerðina av fíggjarætlanini fyri 2011 (j. nr. 2010-0547), legði borgarstjórin á býráðsfundi hin 11. nov. 2010 fram yvirlit yvir lidnar og aðrar verkætlanir (j. nr. 2010-2717/1), – ið heitt verður á avvarðandi nevndir um at gera upp og loka og síðani at leggja fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina uppskot um at nýta avlopið til nýggjar verkætlanir sbr. skjali um uppgerð yvir lidnar verkætlanir og nýggjar verkætlanir.

Ein meiriluti í býráðnum samtykti at taka undir við at heita á avvarðandi nevndir um at gera upp og loka slíkar verkætlanir.

Á trivnaðarøkinum er talan um niðanfyri standandi verkætlanir at gera upp og loka:

| § 2 | **Almanna- og heilsumál** | | Nýggjar verk. | Saldo |
|---|---|---|---|---|
| 2775 | Saldo lidnar verkætlanir | 488 | | |
| 2275 | Nýggj læknahøli | 250 | | |
| 2775 | Vardar íbúðir | 1.015 | | |
| 2775 | Røktarheim yvir við strond | 1.064 | | |
| | *Køkur Ellisheim* | | 1.850 | |
| | *Kommunulæknaskipanin* | | 950 | |
| | Nýggj Saldo | | | 17 |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at taka undir við at loka lidnar og aðrar verkætlanir, og at játta peningin til aðrar verkætlanir sambært omanfyri standandi yvirliti.

**Sosiala nevnd 7. desember 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Býráðið hevur samtykt umraðfestingar av íløgum í 2013, sum m.a. skulu fíggjast við avlopum av ávísum verkætlanum.

Einki ítøkiligt virksemi hevur verið í verkætlanini at byggja út Ellisheimið til tess at betra um køks- og goymsluumstøðurnar. Upprunaliga játtanin var kr. 1.850.000 (konta 2775, L27003). Brúktar eru kr. 28.000 tilsamans árini 2010, 2011 og 2012 til innanhýsis útreiðslur í sambandi við tekningar og mátingar. Avlopsupphædd at loka er sostatt kr. 1.823.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at loka málið og flyta avlopið til kontu 6175 L61002 keyp av bygningum.

**Trivnaðarnevndin 26. august 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**166/13** **<u>2002-1012</u>**

**<u>Umsókn um byggiloyvi til ítróttarhøll á matr. nr. 917, við Landavegin í Tórshavn.</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Hondbóltsfelagið Neistin søkir um byggiloyvi til ítróttarhøll á matr. nr. 917 við Landavegin í Tórshavn.

Útgangsstøðið fyri høllina er at gera eina høll, sum í støðd tekur støði í støddini á einum hondbóltsvølli, sum lýkur altjóða krøv til innandura hondbóltsvallir viðv. hædd, vídd og umstøðum til leikarar dómarar og áskoðarar.

Góðar umstøður verða til tey rørslutarnaði.

Bygningurin kann býtast upp í sjálvan hallarbygningi, og ein síðubygning, sum partvís er í tveimum hæddum. Samlaða víddin á bygninginum verður 2.945,4m².

Tað verða pláss fyri í alt 910 áskoðarum, harav tey 680 verða sitipláss.

Útveggir og tekjan verða klædd við profileraðum aluminiumsplátum. Vindeygu og úthurðar verða úr aluminium.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í umráðisparti D2 ítróttarøki, og er umsóknin viðgjørd eftir almennu byggisamtyktini.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Grundøkið, matr. nr. 917, er 16.843 m² til víddar.
Byggistigið verður 0.17. Mest loyvda byggistig er 0.25.
Nettonýtslustigið verður 0.24. Mest loyda nettonýtslustig er 0.3.
Tal av bilstøðlum fult útbygt 273. Kravt tal av bilstøðlum 4117,4 / 50 = 82.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarligt:**
Fíggjarnevndin hevur samtykt á fundi 15. mars 2006 at játta kr. 7.250.000,- yvir 5 ár.

**Skjøl:**
Umsókn og tekningar, j.nr. 2002-1012.
Støðumynd í mát 1:1000.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir nevndini at ganga umsóknini á møti, at senda málið til grannakunningar, og at útskriva byggiloyvi, tá aðrir myndugleikar, ið hava heimild at seta krøv, hava góðkent byggingina. Samstundis at beina málið í teknisku nevnd, í sambandi við ætlaða vegin fram við vestara markinum, sum skal samanbinda Landavegin og Marknagilsvegin, umframt eitt møguligt bussteðgipláss í sambandi við høllina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. september 2006:** Nevndin samtykti at beina málið í fíggjarnevndina til avgreiðslu av lendisspurninginum.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at leiga Neistanum hóskandi/neyðugt lendi av matr. nr. 917 til bygging av ítróttarhøll við neyðugum uttanum øki til parkering v.m. við somu treytum og leiguupphædd sum aðrir ítróttarbygningar.

Tilsøgnin um leigu er treytað av, at byggingin er byrjað innan 2 ár.

**Býráðið 21. september 2006**: Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at góðkenna uppskot til leigusáttmála.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008**: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til leigusáttmála.

**Býráðið 27. november 2008**: Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen..

**Ískoyti:**
Neistin ynskir at broyta sáttmálan so at tað verður Stuðlafelagið Neistin, sum kemur at standa sum leigari av grundøkinum, eigari av høllini og móttakari av stuðli. Harumframt ynskja teir at kravið í grein 3 í verandi sáttmála um grundøkið viðvíkjandi møguleikum fyri dupulthøll verður slept.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2010:** Samtykt at beina málið í mentamálanevndina og byggi- og býarskipanarnevndina til skjóta viðgerð.

**Ískoyti:**
Í skrivi, dagfest 21.01.2010, biður Hondbóltsfelagið Neistin um broyting í leigusáttmálanum. Neistin ynskir, at grein 3 verður broytt, soleiðis at tann parturin av greinini, ið snýr seg um møguleikan at byggja eina høll afturat á økinum móti høllini hjá Neistanum, verður strikaður. Hesin partur er soljóðandi:

”Byggingin hjá leigaranum skal verða í mark á útnyrðingssíðuni (niðaneftir), byggingin skal, hvat konstruktiónum viðvíkur verða gjørd soleiðis, at tað í framtíðini ber til at byggja eina høll afturat á ovara partinum av stykkinum í mark móti høllini hjá leigaranum, og soleiðis at opnast kann millum hesar báðar hallir og at tær kunnu sláast saman til eina stóra høll í samband við serlig tiltøk (t.d. multiarena, landsdystir 0.l.).

**Býráðið 28. januar 2010:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 10. februar 2010:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tekniska- og trivnaðarumsitingin eru av kommunustjóranum biðin um at lýsa málið í einum uppriti til viðgerðina í mentamála- og byggi- og býraskipanarnevndini.

Biðið verður um, at gongdin í málinum verður lýst við grundarlagi í teimum samtyktum, ið eru gjørdar í politisku nevndunum, samskiftinum við Neistan, innlatnum tilfari og avtalum umframt grundgevingum og tankum aftanfyri tær treytir, sum býráðið setti í sambandi við góðkenning av leigusáttmálanum. Biðið verður eisini um, at umsitingin á

hesum grundarlagi ger eitt greitt tilmæli í málinum v.v ynskinum hjá Neistanum um at sleppa at broyta verkætlanina frá at byggja til dubulthøll.

Umsitingin hevur síðani gjørt upprit í hesum sambandi (j. nr. 2008-4491/16), har gongdin í málinum er lýst, umframt býarskipanarligu atlitini. Viðv. býarskipanarligu atlitunum kann leggjast afturat, at tekniska umsitingin metir, at nú nýggi bygningurin til skúladepilin í Marknagili er staðsettur og hevur fingið skap, styrkir hetta bert uppaftur meira uppundir, at øll bygging á ítróttarøkinum – matr. nr. 917 – inngongur í heildarskipanina av økinum, soleiðis sum upprunaliga ætlað. Umsitingin hevur í sambandi við skúladepilin havt fund við ráðgevar landsstýrisins um skipan av økinum, við støði í útkasti sum umsitingin hevur gjørt (j. nr. 2008-4491/17).

Gjøgnumgongdin í málinum vísir, at spurningurin um dupulthøll hevur verið viðgjørdur við Neistan líka síðani 2003, og at spurningurin somuleiðis hevur verið viðgjørdur politiskt. Og í samráðingunum uppundir at leigusáttmáli varð gjørdur fyri økið í 2008, var spurningurin eisini viðgjørdur bæði við Neistan og politiskt, tá fíggjarnevnd og býráð einmælt samtyktu leigutreytirnar. Gjøgnumgongdin vísir tó eisini, at tørvur helst eisini er á at fáa eina samlaða skipan av ymsu viðurskiftunum í málinum, herundir veðrætt kommununar fyri higartil játtaða stuðulinum, íbinding í veg og kommunalar leiðingar, eins og spurningin um býti av hallartímum í øðrum kommunalum hallum, tá Neistahøllin er liðug, soleiðis at eisini onnur feløg fáa gagn av, at ein høll afturat kemur í høvuðsstaðnum, soleiðis sum Neistin sjálvur legði upp til í upprunaliga umsøkn síni hin 11. apríl 2002 (j. nr. 2002-1012). Nógv av hesum viðurskiftum eru ikki partur av treytunum í leigusáttmálanum, tilsøgnini um stuðul, graviloyvi o.l.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin, býararkitekturin og leiðarin á mentamáladeildini mæla frá at ganga umsøknini um at strika part av grein 3 í leigusáttmálanum, soleiðis sum søkt er um, men at umsøkjarin fær boð um at halda seg til treytirnar í leigusáttmálanum. Hetta vísandi til omanfyristandandi ískoyti og uppritinum um málsgongd, býarskipanarlig atlit v.m. (j. nr. 2008-4491/16), umframt at hetta vil oyðileggja seinasta møguleikan fyri eini stórhøll innanfyri ringvegin í høvuðsstaðnum. Økið er uml. 17.000 fermetrar til víddar, og tað vil verða at burturspillað økið og teir møguleikar sum økið gevur, at ganga umsøknini á møti. Og samstundis vil tað at ganga umsøknini á møti forða fyri, at onnur ítróttarfeløg ella kommunan kunnu fáa gagn av økinum. Tí verður mett sera umráðandi at planleggja langsiktað, við at hava møguleikan fyri at onnur ítróttarfeløg ella kommunan seinni kunnu byggja hina helvtina av høllini, og harvið fáa eina stórhøll í býnum.

Hinvegin verður tó víst á møguleikan, at taka spurningin um stuðul til byggingina hjá Neistanum upp til nýggja viðgerð, við støði í, at kommunan veitir ein nakað størri stuðul og samstundis leingir stuðulstíðarskeiðið, at dekka part av skjalprógvaðum eykaútreiðslum sum felagið fær av at venda berandi konstruktiónini soleiðis, at uppíbygging er møgulig. Hetta kann samstundis verða treytað av, at tað samstundis verður gjørd ein ískoytisavtala til leigusáttmálan ella ein serstøk rakstraravtala, um nýtslu av høllini til slík serlig tiltøk, sum ein dupulthøllin gevur møguleika fyri.

Somuleiðis eigur høvi at verða nýtt til at tryggja kommununi veðrætt fyri higartil játtaða stuðulin, og at avtala verður gjørd við Neistan um býti av hallartímum í øðrum kommunalum hallum, tá Neistahøllin er liðug, soleiðis at eisini onnur feløg fáa gagn av, at ein høll afturat kemur í høvuðsstaðnum, soleiðis sum Neistin sjálvur legði upp til í upprunaliga umsøkn síni hin 11. apríl 2002 (j. nr. 2002-1012).

At enda verður mælt til, at Neistin fær ikki loyvi til at halda áfram við arbeiðinum tá planeringin er liðug, fyrr enn fullfíggjað prosjekt er latið kommununi at byggimálsviðgera.

Um Neistin ikki ynskir at ganga undir treytirnar sambært leigusáttmálanum, eigur leigusáttmálin at sigast úr gildi, og onnur staðseting at finnast til eina stakhøll, soleiðis sum Neistin ynskir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. mars 2010:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við málinum at gera eina avtalu við Neistan, sum verður at leggja fyri avvarðandi nevndir.

**Ískoyti**
Neistin hevur í skrivi dagf. 27. mai 2010 lagt fram aftur ynskið um at broyta leigusáttmálan soleiðis, at Tórshavnar kommuna gongur frá treytini í leigusáttmálanum um møguleikan fyri dupulthøll. Harumframt verður boðað frá, at høllin kemur at kosta kr. 25 mió, og at Stuðlafelagið Neistin letur kr. 10 mió. Tórshavnar kommuna hevur áður játtað kr. 7,25 mió í stuðli.

Felagið bjóðar nú kommununi ávís serrættindi í høllini mótvegis gjaldi í alt kr. 7,75 mió pluss rentur yvir 10 ár. Upphæddina tekur felagið í láni, har transportur verður gjørdur millum Tórshavnar kommunu og viðkomandi lánistovn.

Serrættindini fyri gjaldinum eru, at kommunan 10 ár fram hevur fyrsta rættin at leiga høllina hvønn gerandisdag frá klokkan átta á morgni til klokkan 14 seinnapart til fólkaskúlar, frítíðarskúlar, dagstovnar, ungdómshús o.líkn. hjá Tórshavnar kommunu. Haraftrat kann kommunan í samráð við Neistan fyriskipa rúsfríar konsertir o.líkn. í vikuskiftum. Dentur verður lagdur á, at tiltøkini ikki skulu fara illa við høllini.

**Ískoyti**
Neistin hevur í skrivi dagf. 27. mai 2010 lagt fram aftur ynskið um at broyta leigusáttmálan soleiðis, at Tórshavnar kommuna gongur frá treytini í leigusáttmálanum um møguleikan fyri dupulthøll. Harumframt verður boðað frá, at høllin kemur at kosta kr. 25 mió, og at Stuðlafelagið Neistin letur kr. 10 mió. Tórshavnar kommuna hevur áður játtað kr. 7,25 mió í stuðli.

Felagið bjóðar nú kommununi ávís serrættindi í høllini mótvegis gjaldi í alt kr. 7,75 mió pluss rentur yvir 10 ár. Upphæddina tekur felagið í láni, har transportur verður gjørdur millum Tórshavnar kommunu og viðkomandi lánistovn.

Serrættindini fyri gjaldinum eru, at kommunan 10 ár fram hevur fyrsta rættin at leiga høllina hvønn gerandisdag frá klokkan átta á morgni til klokkan 14 seinnapart til fólkaskúlar, frítíðarskúlar, dagstovnar, ungdómshús o.líkn. hjá Tórshavnar kommunu. Haraftrat kann kommunan í samráð við Neistan fyriskipa rúsfríar konsertir o.líkn. í vikuskiftum. Dentur verður lagdur á, at tiltøkini ikki skulu fara illa við høllini.

Fíggingin
Verða kr. 7,75 mió lagdar aftrat áður játtaða stuðlinum, verður kommunali parturin av byggingini í alt kr. 15 mió, ella 60%. Áður játtaði stuðulin uppá kr. 7,25 mió er býttur yvir 5 ár, og eftir at gjalda er kr. 3.022.000 í 2011 og kr. 1.052.000 mió í 2012 av kontu 5370 Stuðul til íløgur.

Árliga gjaldið til meirfíggingina kr. 7,75 mió pluss 6% p.a. í rentu yvir 10 ár verður uml. kr. 1.050.000.

Fyri ta meirfígging, sum kommunan skal lata fyri ávísan nýtslurætt í høllini, er roknaða leigan yvir kr. 800 um tíman (6 tímar um dagin, 5 dagar um vikuna, 10 mðr um árið). Hetta er meira enn ferfalt leiguprísinum í kommunalu hallunum, og hóast at kommunan kann fáa gleði av nýtslurættinum til børn og ung – fyrst og fremst uttanfyri skipaðu ítróttafeløgini, so er hetta tó kostnaðarliga als ikki kommununi til fyrimunar.

Metast má vera sera óheppin gongd, um ítróttaverkløg, ið ítróttafeløg formliga standa sum byggiharrar og ánarar yvir, skulu hava 60% av byggikostnaðin játtaðan frá kommununi, harav 30% skulu eyðmerkjast sum nýtslugjald. Hetta er ikki í samsvari við siðvenjuna, at kommunan rindar 30% í stuðli. Tørva verkætlanir veruliga 60% í stuðli ella reellari fígging frá kommununi fyri at verða realiseraðar, so er rættari mannagongd, at kommunan sjálv stendur sum byggiharri og ánari, so at íløgan kann koma fleiri ítróttafeløgum til gagns.

Sum heild er talan um sera stóra og serstaka kommunala fígging til ítróttahøll hjá einstøkum felag, og sum onnur ítróttafeløg í útgangsstøðinum ikki fáa nakran ágóða av. Neistin hevur frammanundan 17,5 venjingartímar í Høllini á Hálsi. Kommunan eigur í minsta lagi at krevja hesar tímar frá Neistanum, so at kommunan fyri meirfíggingina til Neistan og ávísan nýtslurætt til nýggju høllina eisini kann skapa betri hallarumstøður til onnur ítróttafeløg í kommununi. Hetta eigur at verða avgjørt krav.

Skal kommunan binda seg til at játta og gjalda millióna brúksgjald komandi 10 árini, so eigur at verða gjørdur ein formligur sáttmáli hesum viðvíkjandi. Men uttan mun til hetta, er veruligi leigukostnaðurin so mikið høgur, at mælt verður frá hesi ætlan um meirfígging til byggingina.

Leigusáttmálin
Ynskið frá Neistanum um, at kommunan gongur frá kravinum um dupulthøll, krevur broyting í leigusáttmálanum. Sum omanfyri er lýst (málslýsingin til fundin í byggi- og

býarskipanarnevndini 22. mars 2010), hevur staðsetingin av høllini beinleiðis samband við treytina um dupulthøll. Mælt varð tá frá broytingini, og hetta tilmælið stendur við.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla framvegis frá at broyta tann partin av leigusáttmálanum, sum fevnir um møguleikan fyri dupulthøll. Víst verður í hesum sambandi til útgreinaða tilmælið til áðurnevnda nevndarfundin 22. mars 2010.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla somuleiðis frá at játta kr. 7,75 mió pluss rentur yvir eitt 10 ára skeið aftrat teimum kr. 7,25 mió í stuðli, sum áður eru játtaðar til høllina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla framvegis frá at broyta tann partin av leigusáttmálanum, sum fevnir um møguleikan fyri dupulthøll. Víst verður í hesum sambandi til útgreinaða tilmælið til áðurnevnda nevndarfundin 22. mars 2010.

**Mentamálanevndin 21. juni 2010:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at broyta leigusáttmálan fyri lendið soleiðis, at Neistin kann byggja eina einstaka høll, og at byggingin skal verða staðsett soleiðis á økinum, at tilber at byggja verklag til ítróttarendamál á grannastykkinum (restini av matriklinum).

Nevndin samtykti at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 7,75 mió í stuðli til høllina, at gjørdur verður leigusáttmáli um ókeypis nýtslurætt hjá kommununi í høllini, at lýst verður veð fyri meirjáttanini (7,75 mió kr.) í bygninginum í 25 ár, og at venjingartímarnir hjá Neistanum í kommunalu høllini á Hálsi koma øðrum ítróttarfeløgum til góðar.

Sambært ætlaða leigusáttmálanum um nýtslurætt skal kommunan í 10 ár fram eitt nú hava fyrsta rætt til at leiga høllina hvønn gerandisdag frá kl. 8 á morgni til kl. 14. Haraftrat kann kommunan í samráð við Neistan fyriskipa rúsfríar konsertir o.líkn. í vikuskiftum, handilsstevnur og onnur størri tiltøk.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við mentalálanevndini, at broyta leigusáttmálan fyri lendið soleiðis, at Neistin kann byggja eina einstaka høll, og at byggingin skal verða staðsett soleiðis á økinum, at tilber at byggja verklag til ítróttarendamál á grannastykkinum (restini av matriklinum).

Elin Lindenskov var ikki við til viðgerðina av hesum máli.

**Fíggjarnevndin 24. juni 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini 21. juni 2010 og byggi- og býarskipanarnevndini 23. juni 2010.

Samtykt at mæla býráðnum til at játta 7,75 mió. kr. í stuðli, ið verður at útgjalda yvir 10 ár – í fyrsta lagi frá 2011. Stuðulin er treytaður av góðkenning frá landsstýrinum, smb.

Roknskaparkunngerðini nr. 124. frá 22. desember 2000 um ábyrgdarbindingar, veðhald, v.m. sambært kommunustýrislógini.

Somuleiðis samtykt at mæla býráðnum til, at Tórshavnar kommuna fyri samlaðu stuðulsupphæddina á 15 mió. kr. fær veð í høllini fyri hesa upphædd.

**Býráðið 24. juni 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Neistin hevur í skrivi 6. september vent aftur við nýggjari umsókn. Í umsóknini vísir felagið á, at Neistin á fundi við Tórshavnar kommunu eisini hevði spurningin um rentur inni í mynduni, men at tær ikki vóru við, tá ið málið kom fyri á býráðsfundi.

Neistin vísir á, at fyribils kostnaðarætlanin, við Gundadalshøllini sum fyrimynd, vísir, at høllin kostar kr. 750.000 at reka um árið. Felagið metir, at tað verður torført at reka høllina við Landavegin, tá ið Stuðlafelagið Neistin samstundis má lána tríggjar milliónir, sum resta í tíggju milliónum í eginpeningi, og so eisini gjalda rentur av teimum 7,75 milliónum í 10 ár.

Neistin søkir tí Tórshavnar kommunu um at fáa stuðulin 7,75 mill. kr. goldnar yvir tvey roknskaparár, ávíkavist í 2011 og 2012.

Viðv. fyrispurninginum til Fíggjarmálaráðið um at rinda stuðulin út yvir fleiri ár, so fekk kommunan í fyrstu atløgu noktandi svar vísandi til, at tað er torført at vísa á langtíðar realbúskaparligir fyrimunir. Til dømis verður skuld aloftast rentað bíligari hjá kommunum enn hjá felagsskapum. Tórshavnar kommuna hevur svarað Fíggjarmálaráðnum skrivliga og víst á fyrimunir við at gjalda út yvir fleiri ár og havt fund við ráðið um málið. Fíggjarmálaráðið vísir nú á eina trý ára loysn – 2011-2013, men málið er ikki endaliga avgreitt.

Skal kommunan játta umbønini hjá Neistanum, er neyðugt við umraðfestingum á fíggjarætlanini fyri 2011 (og 2012) ella at kommunan tekur lán at fíggja høllina hjá Neistanum við. Á fíggjarætlanini fyri 2011 eru settar av 1.050.000 kr. í stuðli til Neistan.

Fíggjarætlanin fyri 2011 er løgd fram í býráðnum og eingin ætlan er um at hækka lánini hjá kommununi; tískil tykist tann møguleiki útilokaður. Ein 10 ára loysn er ein dýr loysn, har Neistin/kommunan rinda 2.750.000 kr. í rentum. Út frá einum fíggjarligum sjónarmiði loysir tað seg tí betur at rinda høllina í byggitíðini.

Skal kommunan fylgja hesum leisti, nú býráðið hevur játtað Neistanum 7.750.000 kr. afturat í stuðuli, er ein møguleiki at rinda upphæddina yvir 3 ár, fyrstu ferð 2011. Upphæddin verður tá kr. 2.600.000 kr. um árið í 3 ár, tvs 1.550.000 kr. afturat til Neistan á fíggjarætlanini fyri 2011 .

Ein annar møguleiki er at halda fast við verandi samtykt og lata Neistan útvega peningin á annan hátt vísandi til, at kommunan longu sum er, hevur játtað 15 mió. kr. til høllina

umframt grundstykkið. Hetta er væl meira, enn hvat siðvenjan hevur verið at rinda í stuðuli at byggja hallir v.m. fyri.

**Fíggjarnevndin 6. oktober 2010:** Mælt verður býráðnum til at staðfesta áður gjørda samtykt frá 24. juni 2010 við teirri broyting, at stuðul áljóðandi 7,75 mió. kr. verður játtaður yvir trý ár – fyrstu ferð í 2011.

**Býráðið 21. oktober 2010:**

Heðin Mortensen legði fram soljóðandi uppskot til samtyktar:

"*Samtykt at taka undir við fíggjarnevndini tó við teirri broyting, at játtaður verður ein samanlagdur stuðul áljóðandi 60 prosent av byggikostnaðinum. Stuðulin verður roknaður av einari upphædd, ið ikki kann fara upp um 25 milliónir krónur.*"

Einmælt samtykt.

Formaðurin ynskir hetta málið á skrá:

**Ískoyti:**
Neistin hevur vent sær til býráðið viðvíkjandi samtyktini um nýtslurættin hjá kommununi til høllina. Felagið ger vart við, at samtyktin um ókeypis nýtslurætt yrkadagar kl. 08.00-14.00 samsvarar ikki við umsóknina, sum Neistin læt inn í 2010. Har varð lagt upp til, at kommunan fekk fyrsta rætt til at leiga høllina.

Neistin vísir á, at uttan leiguinntøkur ber ikki til at reka høllina, og tí kann felagið heldur ikki byggja høllina.

Tórshavnar býráð hevur við sínum samtyktum tikið undir við, at Neistin byggir eina ítróttarhøll í Vesturbýnum. Ásannast má, at tað ber ikki til at leggja slíkar treytir við stuðlinum frá kommununi, at felagið, sum fær stuðulin, ikki orkar at reka høllina, tá ið hon er bygd.

Tí verður mælt til at orða samtyktina um kommunurnar nýtslurætt til høllina við Landavegin á henda hátt:

"Kommunan hevur í 10 ár fyrsta rætt at leiga høllina hvønn yrkadag frá kl. 08.00 til 14.00. Í samráð við Neistan kann kommunan eisini í vikuskiftum skipa fyri rúsfríum konsertum o.líkn., stevnum og øðrum størri tiltøkum. Kommunan og Neistin áseta á hvørjum ári, hvønn tørv kommunan hevur á høllini."

**Mentamálanevndin 18. mai 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Ískoyti:**

Býráðið samtykti á fundi 21. oktober 2010 at játta Neistanum 7,75 mió. kr. afturat í stuðli. Partur av samtyktini ásetur, at kommunan fær ein ókeypis nýtslurætt til høllina í tíðarskeiðnum 8-14 yrkadagar, umframt konsertir o.a. í vikuskiftinum. Sum lýst omanfyri ynskir Neistin at hesin ókeypis nýtslurættur verður strikaður, grundað á, at tað ber ikki til at reka høllina uttan leiguinntøkur.

Virðið á ókeypis nýtslurætti verður mett til kr. 270.000 um árið – roknað út frá tí, sum Neistin hevur upplýst.

At strika nýtslurættin til Neistahøllina, kann fáa avleiðingar fyri leistin, sum er brúktur fyri høllina hjá Dansifrøði. Har er eisini ásett regla um ókeypis nýtslurætt.

Í avtaluni við Dansifrøi er ásett, at Tórshavnar kommuna hevur rætt at nýta felagshølini hjá Dansifrøi ókeypis tveir leygardagar um mánaðin frá kl. 8.00 til kl. 7.00 dagin eftir. Verða leygardagarnir skiftir út við yrkadagar, verða tveir yrkadagar latnir í staðin fyri. Hetta tykist eitt sindur minni víðfevnandi enn hjá Neistanum.

Sum kommuna hava vit skyldu at viðgera feløgini eins. Avleiðingin av at strika treytirnar hjá Neistanum viðv. ókeypis nýtslurætti kann tískil viðføra, at kommunan eisini má strika ókeypis nýtslurættin íhøllini hjá Dansifrøi, um søkt verður um tað.

Tað fyriliggja ikki skjøl uppá, hvørt raksturin í Neistahøllini hongur saman ella ikki, tí er torført at meta um hetta. Felagið er biðið um at útvega rakstrarætlan fyri høllina.

At kommunan letur 60% í stuðli til eina høll, sum ikki ber seg rakstrarliga, hongur ikki saman.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla tí til, at kommanan saman við Neistanum finnir ein leist, har kommunan varðveitir ókeypis ein nýtslurætt, tó so, at nýtslurætturin í størri mun minnir um leistin hjá Dansifrøi, og tískil er minni víðfevnandi.

**Fíggjarnevndin 8. juni 2011:** Samtykt at heimila umsitingini at taka upp samráðingar um eina endaliga loysn, sum verður at leggja fyri ein eyka fíggjarnevndarfund.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur samráðst við felagið. Loysnin er ein avtala um ókeypis nýtslurætt eftir mestsum sama leisti sum avtalan, ið kommunan hevur við Dansifrøi. Eftir hesum kemur kommunan at hava rætt til at nýta ítróttahøllina hjá Neistanum ókeypis tveir dagar um mánaðin – antin leygardag ella sunnudag, tó so, at atlit skal takast til heimadystir Neistans. Møguleiki er eisini at brúka fríggjadag, hóskar tað til venjingarnar hjá Neistanum, eins og møguligt er at nýta onkran yrkadag í staðin fyri vikuskiftisdagarnar.

Hvørt hálva ár verður ein skrá løgd fyri nýtsluna hjá kommununi fyri komandi hálva árið. Um kommunan skal nýta nýtslurættin ávísan dag, skal kommunan boða frá hesum í seinasta lagi 14 dagar frammanundan.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla býráðnum til um fíggjarnevndina at taka undir við omanfyristandandi uppskoti um broyttar nýtslutreytir í ítróttarhøllini hjá Neistanum.

**Fìggjarnevndin 15. juni 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum um avtalu um ókeypis nýtslurætt tveir dagar um mánaðin.

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Neistin hevur vent sær til Tórshavnar kommunu við umbøn um fáa broytt leigusáttmálan, sum varð undirskrivaður millum partarnar tann 10. november 2008 og um at fáa broytt onnur viðurskifti millum kommununa og Neistan ísv. ætlanirnar at byggja hondbóltshøll á matr. nr. 917, Tórshavn.

Ynski hjá Neistanum snúði seg um, at fáa strikað orðingina í § 5 í sáttmálanum, sum er soljóðandi:

*Grein 5*

Tá leigumálið gongur út, hevur útleigarin rætt til at gerast eigari av tí, ið bygt er á økinum, fyri tað, sum tað verður mett til. Virðismetingin verður gjørd av 3 óvildugum fólkum tilnevnd av Føroya Rætti.

Ynskir útleigarin ikki at yvirtaka tað bygda, hevur leigarin rætt til framhald av leigumálinum í upp til 20 ár afturat.

Ynskir útleigarin at siga upp leigusáttmálan í 20 ára framhaldsskeiðinum, kann hann gera hetta við 6 mánaða ávaring til tann 1. í einum mánaði. Útleigarin hevur tá rætt til at gerast eigari av tí, ið bygt er á økinum, fyri tað, sum tað verður mett til, frádrigið 1/20 um árið. Aftaná 20 ára framhaldsskeiðið hevur útleigarin sostatt rætt til at gerast eigari av ti, ið bygt er á økinum, uttan kostnað.

Studningur/stuðul veittur av Tórshavnar kommunu og/ella Føroya landsstýri verður altíð mótroknaður í endurgjaldinum.

Eisini ynskti Neistin at fáa váttan frá Tórshavnar kommunu, at hon er sinnað at víkja fyri einum bankaláni til Neistan, soleiðis at kommunan fær 2. veðrætt í høllini aftanfyri eitt veð á 9 mió. kr. til BankNordik.

Viðv. spurninginum um víking boðaði kommunan frá, at hon er sinnað at víkja fyri einum láni frá BankNordik, um hetta gerst neyðugt.

Viðv. bankaláninum, ið Neistin hevur fingið tilsøgn um, skal verða víst á, at bankin hevur sett sum treyt fyri at veita Neistanum lán, at Neistin hevur brúkt sínar 7 milliónir umframt tær 15 milliónirnar, ið kommunan hevur játtað í stuðli, áðrenn útgoldið verður av láninum frá bankanum. Harumframt skal gerast ein uppgerð av byggingini, tá ið 22

milliónir eru brúktar, og vísir tað seg tá, at byggingin verður dýrari enn mett, verður einki útgoldið av láninum, fyrrenn Neistin hevur funnið meirfígging til tað, ið byggingin verður dýrari.
BankNordik upplýsir soleiðis um orsøkina til, at bankin ikki vil rinda út av láninum beinanvegin:

"*Tað er soleiðis at bankin oftani sær, at ætlanir ikki halda, sum upprunaliga mett, og at avvarandi feløg/persónar tá ikki hava orku at lyfta meirkostnaðin. Tað sum vit vilja tryggja okkum er, at um ætlanin gerst dýrari enn ætlað, so kann ikki brúkast av bankans játtan uttan at merikostnaðurin kann fíggjast. Vit vilja ikki koma í eina støðu at standa við "hálvlidnari" høll og hava brúkt 8 mió. uppá tað.*

*Um høllin gerst dýrari, og hesin meirkostnaður kann fíggjast, er lán bankans tøkt. Hinvegin merkir tað ikki, at vit uttan víðari gótaka at ein meirkostnaður skal berast av Neistanum sum lán, tí tað fer at gera tað trupult hjá felagnum at svara sínum skyldum. Sostatt skal ein meirkostnaður sum útgangsstøði innheintast sum stuðul til ætlanina/felagið.*"

Viðv. ásetingini í § 5 í leigusáttmálanum skal verða víst á, at hetta er júst sama orðing, sum er nýtt í leigusáttmálanum við Dansifrøi um lendi undir høllini hjá felagnum.
Kommunan hevur tó skotið upp fyri Neistanum at broyta § 5, so hon verður soljóðandi:

"*Tá leigumálið gongur út, hevur útleigarin rætt til at gerast eigari av tí, ið bygt er á økinum, fyri tað, sum tað verður mett til. Virðismetingin verður gjørd av 3 óvildugum fólkum tilnevnd av Føroya Rætti. Mótróknað verður tó altíð í minsta lagi fyri samlaðu krónuupphæddina, ið kommunan hevur latið í studningi í sambandi við byggingina av hondbóltshøllini.*

*Er virðið á tí, ið bygt er á økinum, hægri enn upphæddin, ið Tórshavnar kommuna hevur latið í studningi, skal mótrokningin gerast upp samsvarandi lutfallið millum studning og samlaðan byggikostnað sambært endaligum byggiroknskapi. Dømi um hetta er eitt nú, at hevur kommunan latið 50 % av byggikostnaðinum í studningi, verður endurgjaldið frá útleigara til leigara sostatt 50 % av virðismetingini i tann mun, hesi 50 % umboða eina størri krónupphædd enn studningurin frá Tórshavnar kommunu.*

*Ynskir útleigarin ikki at yvirtaka tað bygda, tá leigumálið gongur út, kann leigumálið verða framlongt í eitt av Tórshavnar býráð ásett áramál og við treytum, ið verður ásettar av Tórshavnar býráði.*"

Kommunan hevur ísv. uppskotið um broytta § 5 víst á, at verður mótroknað í minsta lagi fyri samlaðu krónuupphæddina og annars í einum lutfalli millum studning og byggikostnað, er kommunan í minsta lagi tryggjað at fáa pengarnar aftur, sum kommunan setti í høllina. Harumframt er kommunan tryggjað at fáa lut í einari møguligari virðisøking av ognini. Umsitingin sær onga orsøk til, at ein møgulig virðisøking eina og aleina skal falla til Neistan – serliga ikki, tá ið virðisøkingin er skapt við kommunalum pengum. Við hesi loysn verður virðisøkingin býtt javnt millum stuðulsveitara og eigara.

Hesin leistur skuldi ikki gingið út yvir – men kanska heldur økt um - hugin at viðlíkahalda høllina, tí tann til ta tíð gjørda virðismetingin tekur møguligt viðlíkahald við í metingina av virðinum á høllini.

Sum argument fyri, at kommunan eigur at fáa lut í virðisvøkstrinum – eisini inkl. møguligar forbetringar og viðlíkahald – kann eisini verða víst á, at kommunan á tann hátt fær nakað afturfyri at hava lænt økið hjá sær út fyri ongar pengar í 25 ár. Eitt øki, ið – um tað varð selt – kundi givið kommununi eina størri millióna upphædd í kassan.

Neistin hevur ikki vent aftur við einum svarið uppá, um felagið kann taka undir við uppskotinum til broyttan leigusáttmála. Í telduposti tann12. august svarar umboð fyri hallarbólk Neistans, at:

*"Hetta er ikki tað vit høvdu væntað og roknað við, men vit hyggja at hesum og viðgerða tað."*

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Málið útsett eftir umbøn frá Neistanum.

**Ískoyti:**
Neistin hevur boðað kommununi frá, at felagið byggir ikki ítróttahøllina, sum felagið hevur fingið játtað stuðul til, eins og felagið ynskir afturrindað kostnaðir, sum felagið hevur borið av verkætlanini.

Neistin hevur sent kommununi skjøl og yvirlit yvir samlaða kostnaðin. Eisini framgongur, hvat kommunan hevur rindað felagnum aftur, og hvat Neistin hevur ikki fingið afturrindað av kommununi.

Samlað hevur verkætlanin kostað kr. 5.315.675,75 v/mvg. Av hesum hevur kommunan goldið kr. 3.223.875,75. Henda upphædd fevnir eisini um fult mvg 25%.

Rokningar, sum Neistin hevur borið sjálvt, og tær liggja síðst í tilgongdini í sambandi við prosjektering og útbjóðing av høllini, er kr. 2.091.800,00.

Tað, sum kommunan hevur goldið, svarar til 60,65%. Hetta samsvarar væl við tann stuðul, kommunan hevur bundið seg til at veita, nevniliga 60% av byggikostnaðinum upp til í mesta lagi kr. 15 mió. Munurin er kr. 34.470,30, sum kommunan eigur til góðar.

Málið eigur at verða lokað soleiðis, at lutfallið er neyvt 60/40 samsvarandi býráðs-samtyktini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka til eftirtektar, at Neistin byggir ikki ítróttahøllina, og at málið verður endaliga lokað soleiðis, at kommunan rindar 60% av samlaða kostnaðinum higartil.

**Mentamálanevdin 5. desember 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. desember 2012:** Vísandi til, at Neistin - í mun til samlaðu útreiðslurnar higartil - hevur fingið tann stuðul, ið býráðið hevur bundið seg til, ið er 60% av í mesta lagi 15 mió. kr., mælir fíggjarnevndin býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 13. desember 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Til tess beinanvegin at fáa kommununi øll rættindi aftur til økið, sum Neistin hevur planerað til ítróttahøll við Landavegin, er avtala gjørd við Hondbóltsfelagið Neistan um endaliga fíggjarliga uppgerð av allari verkætlanini og at strika leigusáttmálan um lendið dagfeset 10. november 2008 (leigusáttmálin er í málið 2008-4491).

Sum omanfyri lýst hevur Neistin í alt brúkt góðar kr. 5,3 mió til fyrireikingar, planering v.m., harav hevur býráðið goldið 60% í stuðli, uml. 3,2 mió kr. Á fundi 13. desember 2012 staðfesti býráðið, at tað hevði hildið sínar skyldur í mun til sjálvan stuðulin.

Avtalan, sum er treytað av samtykt býráðsins, ásetir, at Hondbóltsfelagið Neistin fær goldið kr. 1,2 mió fyri endaliga fíggjarliga uppgerð, og at leigusáttmálin um lendið samstundis verður strikaður. Kommunan hevur við hesum øll rættindi til økið.

Mett verður, at gjaldið kann játtast av kontu 5370 stuðul til íløgur, har játtan er tøk.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja avtaluna og játta kr. 1,2 mió av kontu 5370 stuðul til íløgur til Hondbóltsfelagið Neistan sum endaliga fíggjarliga uppgerð, og at leigusáttmálin um lendið verður strikaður.

**Mentamálanevndin 28. august 2013:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**167/13** **2010-2603**

**Søla av lendi til Landsverk. Miðnámskúlin í Marknagili.**

**Málslýsing - samandráttur**
Landsverk hevur tørv á at kunna keypa uml. 200 fermetrar lendi burtur av matr. nr. 912a, sum er privatogn.

Landsverk og privatu eigararnir, hava samrátt seg til eina avtalu um makaskifti, sum inniber at kommunan eisini letur lendi til makaskiftið.

Privatu eigararnir fáa sambært hesi avtalu 376 fermetrar burtur av matr. nr. 1.100, sum er ogn hjá kommununi, og lata afturfyri 200 fermetrar burtur av matr. nr. 912a. Privatu eigararnir rinda kr. 137 pr. fermeturin fyri hesar 176 fermetrarnar.

Umsitingin hjá kommununi metir at tað er ein greiðari loysn at kommunan selur Landsverk lendið, heldur enn at undirskriva eina trýpartaavtalu um makaskifti og keyp.

Landsverk kann tá sjálvt avgreiða málið við privatu eigararnar.

**Tilmæli.**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at selja Landsverk umleið 376 fermetrar burtur av matr. nr. 1.100 fyri kr. 137 fermeturin. Keyparin rindar allar útreiðslur í sambandi við víðari avgreiðslu av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**168/13** **2013-2067**

**Keyp av lendi til veg (Brúgvin um Sandá)**

**Málslýsing - samandráttur**
Í sambandi við vegagerð, er neyðugt at ogna sær uml. 275–300 fermetrar av lendi burtur av matr. nr. 35a, Kirkjubøur – Argir.

Eigari er Liljan Thomsen.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at keypa lendið fyri ásettan prís, sí notat í málinum 2013-2067/3, fíggja av projekti 8175 Vegir L 81003 Glyvursvegur v/Brúgv

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við timælinum og játta kr. 50.000,00 av konto 8175 vegir L81003 Glyvursvegur v. brúgv.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**169/13** <u>**2013-1022**</u>

<u>**Berjabrekka 3**</u>

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Nevndin fyri sjálvsognarstovnin Berjabrekka 3, hevur á nevndar fundi 3. apríl 2013 samtykt at avvikla sjálvsognarstovnin og at afturgjalda stovnarunum peningin.

Roknskapurin verður uppgjørdur í løtuni, men mett verður at Tórshavnar kommuna fær uml. 1.8 mió kr. afturgoldnar. Víðari samskifti í málinum fer fram millum Tórshavnar kommunu og Bústaðir.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Tikið til eftirtektar.

Borgarstjórin luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt

**Ískoyti:**
Í sambandi við uppgerð av Sjálvsognarstovninum Berjabrekka 3 hevur kommunan móttikið kr. 1.859.071,74. Upphæddin er bókað á 20910 sum óvæntað inntøka.

**Tilmæli:**
Fyrisitingarstjórin og leiðarin á fíggjardeildini mæla til at flyta játtan á 1.859 t.kr. av konto 20910 aðrar inntøkur til konto 6175 – L61011-L6101 BankNordik, Keyp av bygningum.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til við eykajáttan at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**170/13** **2013-1030 HH**

**Umsókn um øki til bensinstøð í Hoyvík**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Effo søkir um at kunna keypa eitt øki á uml. 2.000 $m^2$ har ætlanin er at byggja eina bensinstøð, sum verður til víddar uml. 350 $m^2$.

Umsøkjarin vísir á eitt øki við Vegin Langa í Hoyvík, millum Per Mohrs veg og Djúpagilsvegin, niðanfyri Býlingshúsið Vesturi á Flat. Partur av matr. nr. 140a, Hoyvík.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at beina málið í teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at beina málið í teknisku nevnd.

Ferðslubólkurin mælir til at viðmæla skitsuætlan, tó verður mælt frá at hava frákoyring út á Per Mohrs veg. Annars vil ferðslubólkurin vísa á, at heggurin sunnan fyri Vegin Langa, við innkoyringina við Djúpagilsvegin, átti at verið lækkaður til frama fyri betri útstýni.

**Ferðslunevndin 25. juni 2013:** Nevndin tekur undir við framløgdu skitsuætlan og vísir til galdandi veganormar. Málið beint í teknisku nevnd til støðutakan.

**Ískoyti:**
Sambært almennu byggisamtyktini liggur økið, ið søkt verður um at keypa, í A1-øki beint norðan fyri D1-økið við Hoydalsá.

Við undantaki av bensinstøðini á Frælsinum, sum liggur í A1-øki, liggja allar hinar bensinstøðirnar í býnum í C-økjum.

Eftir ásetingunum um flokking av virkjum í Tórshavnar kommunu, verður ein bensinstøð uttan verkstað flokkað í 3. flokk og kann tí ikki liggja í A1-øki.

Flokkur 3
Umfatar virkir, ið geva orsøk til ávirkan á sítt umhvørvi, serliga orsakað av uttandura aktiviteti og kann staðsetast í ídnaðarøki evt. í randarøki, sum minni dálkandi virkir. Virkir í hesum flokkinum eru serliga virkir sum tænastuvirksemi og handverkstøð. Frástøðan til bústaðir, er fyri henda flokk uml. 20 - 50 metrar.

Býarskipanardeildin mælir til, at byggisamtyktin fyri hetta økið verður broytt til eitt C1-øki.

Grundøkið hjá samkomuni Lívdin í Hoyvík liggur tætt við har ætlanin er at staðseta bensinstøðina, tí kundi ein byggisamtyktarbroyting eisini umfatað hetta.

**§ 18. Ásetingar fyri umráðispartarnar C1 í 3. grundumráði**

1. Umráðispartarnir verða í síni heild lagdir til miðstaðarbygging, t.e. handlar, skrivstovur, heilsubótarhøli, samkomuhús og tílíkt.

2. Útstykking innan teir einstøku umráðispartarnar verður einans loyvd serstakari byggisamtykt, sum byggivaldið hevur góðkent fyri umráðispartin.

3. Byggistigið má ikki fara upp um 0,4.

4. Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,8 .

Av tí at talan er um kommunala ogn, sum er størri enn 300 fermetrar, skal grundøkið bjóðast út í fríðari sølu ella hava góðkenning frá Innlendismálaráðnum.

**Tilmæli:**
Vísandi til at málið ikki er liðugt viðgjørt, mæla kommunustjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini til, at nevndin tekur støðu til, at ummsitingin skal arbeiða víðari við málinum at leggja fyri komandi fund, málið er á skrá til fundin í ferðslunevndini 25.06.13.

**Tekniska nevnd 25. juni 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Økið talan er um, sum er partur av matr. 140a, liggur millum Vegin Langa og Býlingshúsið á Flat, sum er ein barnagarður og vøggustova. Vestanfyri er Per Mohrs vegur og sethúsaøki. Eystanfyri er Djúpagilsáin, sum gongur niðan í vatnbrunnin við Djúpagil og so víðari niðan til Vatnaskarðar.

Økið liggur uppat tí stóra frílendisøkinum fram við Hoydalsá frá Villingadali til Boðanesgjógv. Djúpagilsáin, saman við einum passandi øki báðu megin við, er ein nátúrligur partur av hesum náttúruøkinum í Hoydølum.

Einki er víst í útstykkingarætlanini, hvat tann parturin, sum liggur eftir av matr. 140a, skal brúkast til.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin viðmælir umsóknini um at keypa lendið og staðsetingini av nýggjari bensinstøð við Vegin Langa, treytað av at tikið verður undir við viðmerkingunum frá ferðslubólkinum og ferðslunevndini um ferðsluviðurskiftini, og at tikið verður undir við tilmælinum frá býarskipanardeildini um at byggisamtyktin fyri hetta økið verður broytt til eitt C1-øki.

**Tekniska nevnd 4. september 2013:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr, Helena D. á Neystabø og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Harumframt samtykti meirilutin at heita á fíggjarnevndina um at taka spurningin upp við umsøkjaran um loysnir við atliti til øktu ferðsluna, sum ein bensinstøð førir við sær, fyri at tryggja eina trygga gongufarleið um Vegin Langa, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við teknisku nevnd og mælir býráðnum til at selja umsøkjaranum neyðugt lendi fyri marknaðarprís við góðkenning frá landsstýrinum.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 16. september 2013:** Atkvøt varð um meirilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið var samtykt við 11 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Bjørghild Djurhuus.

Ímóti atkvøddi: Marin Katrina Frýdal

**171/13** **2013-2048 EYE**

**Býlingavegur millum Blómubrekku og Villingadalsvegin 2. stig**

**Lýsing av málinum, samandráttur.**
Nú ið fyrsti partur av býlingavegnum er gjørdur og handaður kommununi, eigur støða at verða tikin til, hvørt haldast skal fram við vegagerð á teimum umleið 120 metrunum, sum eru eftir at gera, frá íbindingini í útstykkingina hjá Sp/f Barni Poulsen, Baraldsgøta og fram til Villingardalsvegin.

Fyrsti partur av vegnum er gjørdur eftir prosjekti frá HMP-consult (j. nr. 2012-1353/1) fyri umleið kr. 14.000,- fyri meturin. Prosjektuppskot frá UP-Verkfrøði tókt (j. nr. 2010-1960/6), fyri tann partin av vegnum, sum eftir er at gera fram til íbinding í Villingardalsvegin.

Eingin kostnaðarmeting er tøk fyri henda seinna partin av vegnum, men av tí at stórur jarðarmunir eru móti grannaognunum á báðum síðum, sum krevja lutfalsliga høgar stuðlamúrar, má roknast við munandi størri metur kostnað enn á undanfarna parti. Við

einum meturprísi álj. kr. 21.000,- til 25.000,- verður samlaði kostnaðurin fyri hetta vegastrekkið uppá ca. 130 m mettur til umleið 2,7 til 3,2 mió. kr.

Eftir prosjektuppskotinum, verða eisini umleið 25 ferðmetrar av lendi, at útvega hvørjumegin vegamótið við Villingardalsvegin burturav ávikavist matr. nr. 1363p og matr. nr 1362b. Harumframt nakrir fáir fermetrar av matr. nr. 1362b, Tórshavn.

Mett verður, at tað er umráðandi at fara undir vegaarbeiðið, áðrenn tað verður bygt ov tætt við markið til ætlaða vegin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtaðar verða kr. 250.000,- av markaðum íløgukørmum fyri vegir í sambandi við viðgerðina av ársfíggjarætlanini fyri 2014 til at gera liðugt prosjekt og útbjóðingartilfar at leggja fyri nevndina aftur, við støði í fyriliggjandi prosjektuppskoti frá UP-Verkfrøði og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 4. september 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Bogi Andreasen og Helena D. á Neystabø luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**172/13** **<u>2013-2207</u>**

**Kommustýrisskipanin fyri Tórshavnar kommunu**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Umrøtt.

**Býráðið 16. september 2013:** Útsett.

**173/13** **2013-2173**

**Eitt kommunufelag**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Við støði í samráðingum millum stýrisumboð fyri Kommunusamskipan Føroya (KSF) og Føroya Kommunufelag (FKF) er gjørt uppskot til at skipa eitt felag, ið fevnir um allar kommunur í Føroyum, sí notat j.nr. 2013-2173/1

Ætlanin inniber harumframt, at Kommunala Arbeiðsgevarafelagið (KAF) í samráð við SEV og IRF, og Barnaverndarstova Føroya (BVS) gerast ein samanrunnin partur av einum kommunufelag.

Høvuðsendamálið við at skipa eitt felag er at savna orkuna, so at til ber at styrkja tað felags kommunalpolitiska arbeiðið, herundir samskiftið við landsmyndugleikarnar og at veita kommununum betri fakliga tænastu, ráðgeving v.m.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at taka undir við at skipa nýtt kommunufelag fyri allar kommunur í Føroyum samsvarandi fyriliggjandi uppskoti.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**174/13** **2013-1652**

**Keyp av lendi til kommunala útstykking í Hoyvík (Djúpagil)**

Í sambandi við omanfyri nevndu útstykking skal kommunan ogna sær uml. 14.000m² frá Jarðarráðnum.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at keypa lendið til útstykkingina sambært notat. 2013-1652/3.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 1,6 mió. av konto 6175 L610021 til konto 6475 L64004 og beina mælið í býráðið.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**175/13** **2012-2427**

**Avtala um yvirtøku av Landsvegi, í Kirkjubø.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Landsverk hevur í skrivi, dagf. 9. oktober 2012, sent kommununi uppskot til avtalu um yvirtøku av landsvegnum í Kirkjubø. Talan er um strekkið frá vegamótinum Kirkjubøarvegur/Inni á Fjósi til endan á landsvegnum á parkeringsplássinum í Kirkjubø, sum er uml 540 m til longdar. Í uppskotinum til avtalu verður víst á, at kommunan yvirtekur vegin í tí standi hann er í og fær fult ræði og fulla ábyrgd av honum. Samstundis verður víst á, at tá ið landsvegaskráin verður lýst aftur, verður henda dagførd, so at nevnda strekkið **ikki** verður lýst sum landsvegur. At enda verður víst á, at partarnir kunnu gera avtalu um avlýsta vegateinin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitingini at fara í samráðingar við Landsverk um eina yvirtøkuavtalu fyri landsvegin í Kirkjubø, og aðrar vegir, kommunan ynskir at yvirtaka – eitt nú Hóvabrekku. Somuleiðis verður mælt til at fáa í lag avtalu við Landsverk um nærri og smidligari treytir fyri bygging fram við landsvegum, sum eru inni í bygdum øki.

**Tekniska nevnd 22. november 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 26. november 2012:** Mælt verður býráðnum til at yvirtaka vegin frá krossinum og oman á støðna beinanvegin.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**FUNDUR LOKIN KL.  20:20**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Elin Lindenskov | Bjørghild Djurhuus |
| Helena Dam á Neystabø | Sigrún Mohr | Tróndur Sigurdsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andresen | Annfinn Brekkstein |
| Sjúrður Olsen | Jákup Dam | Marin Katrina Frýdal |
| | Heðin Mortensen | |